

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 11 - 2012

# Sjónám - Frálandavinna við at yvirhála fiskivinnu

Tað gongur skjótt tann vegin, at fleiri og fleiri føroyingar velja olju- og frálandavinnuna framum fiskivinnuna. Tí heldur Hanus Kjølbro, leiðari fyri Sjónámi í Klaksvík tað eisini vera rætt, at vit í Føroyum kunnu vera við til at útbúgva føroyingar til nýggju vinnurnar. Sjónám í Klaksvík ynskir í hvussu er at vera við til at nøkta vaksandi eftirspurningin. Bæði stjórin á Tekniska Skúla í Klaksvík og deildarleiðarin fyri sjóvinnupartin, Sjónám eru væl nøgdir, nú dyrnar verða latnar upp fyri almenninginum at skoða Sjónám í liðugt umbygda bygninginum á keiøkinum í Klaksvík. Oljan.fo var við, tá dyrnar vórðu latnar upp fyri almenninginum leygardagin. Vælabygningur Klaksvíkar Sjómansskúli og Trygdarmiðstøðin vórðu løgd saman til ein stovn í 2011 men hava síðani havt ymiskar bústaðir. Hetta er nú broytt, nú skaptir eru nýggir og sera góðir karmar at hýsa bæði sjómansskúla og trygdarmiðstøð á einum og sama stað. Í tí sambandi varð gjørt av at leggja virksemið hjá Klaksvíkar Sjómansskúla í sama bygning fyri at savna útbúgvingarumhvørvið til sjóvinnuna, sum er í Klaksvík. Í bygninginum eru 3 smærri og 3 størri skúlastovur umframt venjingarhylur, ið er góðar 10 m breiður og 4 metur djúpur. Á Sjónámi ganga í løtuni ein sjóvinnuflokkur og ein skiparaflokkur. Harumframt verða lógarkravd skeið fyri sjófólk í fiskivinnuni og frálandavinnuni hildin á Sjónámi. Talan er um lógarkravd trygdarskeið, MOB-skeið, bátaføraraskeið og HUET-skeið, sum nú eisini verða uppstigað til OBST-skeið. Trygdarmiðstøðin, sum hevur fingið neyðugu útgerðina, bjóðar skeið til sjófólk innan trygd og eisini til sjómenn, sum sigla við skipum til tyrlupallar. Nýggja tyrlan og venjingarhylurin eru gjørd til endamálið, og longu í januar mánað næsta ár fer Sjónám at bjóða fram fult trygdarskeið til arbeiði umborð á oljupallum eisini. Tyrluvenjingin telur sum nú er umleið ein triðing av skeiðunum, meðan restin er til sjófólk umborð á skipi og fevnir tað um

fyrstuhálp ol. Venjingin tekur tríggjar dagar. Avtalu við Maersk Tað nýggja er, at venjingin nú verður gjørd uppá lisens frá Maersk Training í Esbjerg  kallað HUET  Helicopter Underwater Escape Training  har tú lærir at bjarga tær úr tyrlu, sum dettur niður í havið, koppar og fer undir. Hetta er eitt skeið tú skal taka fjóðra hvørt ár. Hevur tú ikki slíkt sertifikat so sleppur tú ikki út á ein boripall. Her er so talan um ávís skeið innan sjó- og frálandavinnu. Hanus Kjølbro vónar, at teir í framtíðini eisini kunnu bjóða fram onnur skeið, serstakliga innan frálanda- og oljuvinnuna, so føroyingar heilt sleppa undan at fara av landinum at taka tey. Tað er einki at taka seg aftur í, at tað er ein hópflýggjan av føroyskum sjómonnum úr føroyska fiskiflotanum, tí har eru næstan ongastaðni pengar at forvinna. Hesi fara serstakliga yvir í norska frálandaflotan, sigur Hanus og leggur aftrat, at hetta merkist hjá útbúgvingarstovnum sum eitt nú Sjónám í Klaksvík. Tað gongur kraftiga tann vegin, at fleiri og fleiri føroyingar velja olju- og frálandavinnuna, og tí heldur Hanus Kjølbro tað eisini vera rætt, at vit í Føroyum kunnu vera við til at útbúgva teir til nýggju vinnurnar. Vit síggja, at færri og færri koma til vanligu trygdarskeiðini, sum krevjast fyri at vera við fiskiskipi, tó so at tað enn er stórur eftirspurningur eftir hesum skeiðum. Fyri fáum árum síðani var bíðilisti uppá 500 fólk. Hann er ikki til í dag. Skeiðini eru líka nógv í tali enn, og har er so at siga fult hvørja ferð, men har er einki eyka trýst á longur. Fyrr hevur tað verið so og er tað enn fyri ávís skeið, at føroyingar mugu av landinum fyri at taka skeiðini. Tað ger tað nógv dýrari fyri hvønn einstakan. Fyri at taka eitt skeið uppá seks tímar mást tú oftani vera tríggjar dagar burturi. Vinnarastøða Nú kann tú koyra á morgni og verða heima aftur til nátturða ella seint seinnapartin. Hetta er avgjørt ein win to win støða, tí reiðarar uttanlands spara giting og flúgving og tað hetta kostar at senda ein avstað, og teir fáa eina nógv fegnari manning, tí tað sjómaðurin ikki tímir, tá hann hevur feriu, er at fara í flúgvaran einaferð aftrat. So øll vinna við hesum heldur Hanus Kjølbro. Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur sínar røtur frá Klaksvíkar Sjómansskúla. Táverandi stjórin Frans Jacobsen sá, at tørvurin fór at koma, og tá tað bleiv eitt krav til føroyskar sjómenn, at teir skuldu hava trygdarskeiðini, so víðkaði Klaksvíkar Sjómansskúli sítt útboð. Tað bleiv so stórur eftirspurningur, at Mentamálaráðið gjørdi av at loysa tann partin frá Sjómansskúlanum og inn í Trygdarmiðstøðina, henda nýggja stovnin undir Fiskimálaráðnum. Nú er Trygdarmiðstøðin so komin aftur til Mentamálaráðið saman við Klaksvíkar Sjómansskúla og hevur fingið nýggja heitið Sjónám. Kapping Tekniski skúlin í Klaksvík umsitur trý útbúgvingarøki. Eitt er tekniskar studentur, eitt er SIT, støðisútbúgving innan tøkni og eitt er sjóvinnuútbúgvingarøkið. Rúni Heinesen er stjóri fyri øll økini. Hanus Kjølbro, sum er deildarleiðari fyri sjóvinnupartin og sigur seg vera væl nøgdar við nýggju karmarnar. Hetta er ein umbygdur bygningur, sum upprunaliga varð ætlaður til timburhandil. Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina eru umleið 30 mill. kr. Til ber annars eisini at taka trygdarskeið á sjómansskúlanum í Havn og hjá einum privatum felag har. -Er tað gott, at tað eru trý støð í landinum, sum bjóða fram trygdarskeið ella hevði tað verið betri at savna alt á einum stað? Lyklaorðið er, at kapping er sunn. Tað er helst

galdandi fyri hetta eisini. -Hvat hava tit at bjóða í Klaksvík, sum aðrir ikki hava í sama mun? Vit hava fasilitetirnar, tyrluna og hylin, vit hava fólkið at undirvísa og vit hava lisensavtaluna. Trygdarútgerðin í sambandi við venjingarhylin er eitt liðugt útgerðarkonsept úr Írlandi, sum hevur riggað væl. Frálíkar umstøður Eisini stjórin á Tekniska Skúla í Klaksvík, Rúni Heinesen er væl nøgdur, nú Sjónám kann húsast undir eini lon. Umstøðurnar eru frálíkar, og hetta er eitt stórt framstig í mun til tað vit høvdu frammanundan. Her er gott pláss og alt er nútímans, og tað vænti eg fer at økja um virksemið og trivnaðin hjá teimum , sum arbeiða og koma higar. Hetta er eisini við at skapa lív í á havnalagnum. -Nógv verður tosað um dupultfunktiónir í Føroyum. T.d. er sjómansskúli og tekniskur skúli og trygdarmistøð eisini í høvuðsstaðnum! Er pláss fyri at hava fleiri trygdarmiðstøðir í landinum? Hetta er so tað einasta almenna tilboðiðd av hesum slag, og tað er tað vit umsita. Tað eru aðrir aktørar, sum vit eru í kapping við. Hin almenni parturin er so við Áirnar, og hann hava vit sera gott samstarv við, og tað samstarvið fara vit helst eisini at gera meira burturúr. Rúni Heinesen sigur, at tilgongdin til Sjónám er so mikið stór, at tað hevur verið neyðugt at víðka um lærarapartin. Ætlanin er eisini at byrja uppá nýggj skeið. At savna alt á einum stað ger eisini, at tú nú fær eina felags umsiting. Fyrr vóru tvey skrivstovufólk har, nú er nóg mikið við einum. Stjórin á Tekniska skúla vísir á, at í byrjanini var nærum bara talan um skeið innan sjóvinnuna. Frálandaparturin sær nú út til bara at vaksa, og er hann nær við at yvirhála fiskivinnupartin. Myndir frá almenna tiltakinum leygardagin. NB - Sí eisini myndafrásøgn frá almenna tiltakinum leygardagin.